unesco
Faroese
National Commission

## Tilráðing um etiskar leiðreglur fyri vitlíki

Vitlíki mennist við rúkandi ferð og er eftir stuttari tíð vorðið partur av gerandisdegnum hjá mongum í okkara samfelag. Vitlíki ger gagn á mongum økjum, men hevur eisini umfatandi avbjóðingar við sær. Føroyska UNESCO-nevndin vil við hesi tilráðing minna landsins myndugleikar á tilmæli hjá UNESCO um etiskar leiðreglur um vitlíki, *Recommendation on the Ethics of Artificial Intelligence*, ið vórðu samtyktar á 41. aðalfundi í UNESCO í 2021.

Leiðreglurnar hjá UNESCO byggja á fýra grundleggjandi virði:

1. **Mannarættindi og tign**. Vitlíki skal fremja mannarættindi, og menningin av vitlíki skal vísa virðing fyri hvørjum einstøkum menniskja uttan mun til ætt, húðarlit, trúgv, uppruna, aldur, kyn, mál, sannføring ella brek.
2. **Friðarlig og rættvís samfeløg**. Vitlíki skal ikki elva til spjaðing millum samfelagsbólkar og ikki styrkja fordómar.
3. **Fjølbroytni og inklusjón**. Vitlíki skal tryggja fjølbroytni og umboða ymisk sjónarmið, ymsar heimsfatanir og mentanir.
4. **Umhvørvi**. Umráðandi er hava ans fyri teimum umhvørvisligu og vistfrøðiligu avleiðingum, sum menningin av vitlíki hevur við sær.

Við støði í virðunum hevur UNESCO gjørt leiðreglur og tilráðingar, ið m.a. áseta, at vitlíki ikki má elva til skaða og altíð skal brúkast proportionalt. Menniskjað eigur at vera í miðdeplinum í menningini av vitlíki. Menniskju eiga altíð at hava eftirlit við vitlíki og varðveita tamarhald og vald. Menniskju eiga at hava evstu ábyrgd av teimum loysnum ella úrslitum, sum nýtslan av vitlíki elvir til.

Gjøgnumskygni er altavgerandi. Menniskju eru borgarar í heimsins samfeløgum og mugu vita, nær tey brúka vitlíki, t.d. um vitlíki verður brúkt í samskiftinum við tey, og tey eiga at fáa innlit í, hvat vitlíki verður brúkt til, og hvussu tað verður brúkt.

Næmingar í bæði fólka- og miðnámsskúlum, lesandi á hægri lærustovnum og fólk á arbeiðsmarknaðinum eiga at fáa útbúgving ella tilboð um undirvísing, sum ger tey før fyri at brúka vitlíki sum amboð, og so at almenna vitanin um vitlíki verður styrkt. Í arbeiðinum at menna vitlíki mugu rættindi hjá listafólkum til verk og avrik virðast.

Stjórnir eiga at gera lógir og regluverk, sum tryggja stýring og eftirlit við vitlíki. Føroyska samfelagið stendur, eins og onnur samfeløg í heiminum, framman fyri stórum avbjóðingum og broytingum, og politiska skipanin í Føroyum fer í komandi tíðum at taka støðu til spurningar, sum menningin av vitlíki hevur við sær. Umráðandi er at seta einstaka menniskja í miðdepilin og tryggja, at arbeiðið við at menna vitlíki byggir á greiðar grundreglur.

Tórshavn, 30. apríl 2026

Føroyska UNESCO-nevndin

Herleif Hammer
*stjóri á Tjóðsavninum, formaður*

Bergur Djurhuus Hansen
*dekanur á Fróðskaparsetri Føroya*

Annika Smith
*stjóri á Landsbókasavninum*

Marita Rasmussen
*stjóri á Havstovuni*

Magnus Dam
*stjóri í Kringvarpi Føroya*

Helena Davidsen
*fyrisitari á Umhvørvisstovuni*

Jastrið Gullbein Augustinussen
*umboð fyri Føroya Ungdómsráð*